Álit

í

løgtingsmáli nr. 73/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu (Broytingar í tøkugjaldinum)

Bárður á Steig Nielsen, Magnus Rasmussen, Helgi Abrahamsen, Kaj Leo Holm Johannesen, Johan Dahl, Erhard Joensen og Eyðdis Hartmann Niclasen, tingmenn, hava lagt málið fram tann 7. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 31. mars, 19., 21. og 26. apríl og 4. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Búskaparráðið, Havbúnaðarfelagið Kommunufelagið og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:

Tað hava verið tvey uppskot um tøkugjøld á alivinnuna løgd fyri Løgtingið, eitt frá tinglimunum hjá Sambandsflokkinum og eitt frá samgonguni, ið landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum hevur lagt fram. Meginreglurnar í báðum uppskotunum eru tær somu. Tað verður ásett eitt grundgjald á alivinnuna, sum er eitt slag av nýtslugjaldi á 0,5% fyri alifirðirnar, og verður hetta gjaldið goldið uttan mun til framleiðslukostnað og marknaðarprísir. Somuleiðis taka bæði uppskotini hædd fyri framleiðslukostnaðinum í alivinnuni og prísunum á altjóða marknaðinum, sum er skrásettur á Fish Pool indexinum. Tó er munur á tøkugjaldsstiganum í uppskotunum báðum. Har uppskotið hjá Sambandsflokkinum hevur 5 stig og endar við 10%, sum tað hægsta gjaldið, hevur samgongan fleiri interval, íalt 9 stig, og hevur eitt hægsta gjald á 20 %. Partarnir vóru tí nakað langt frá hvørjum øðrum til, at semja kundi fáast ímillum uppskotini, og tí verður ikki tikið undir við hesum uppskoti.

Hesin minnilutin tekur ikki undir við málinum, og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Erhard Joensen og Eyðdis Hartmann Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:
Fyriliggjandi uppskot tekur støði í einum uppskoti, løgtingsmáli nr. 19/2022, sum Magnus Rasmussen, táverandi landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum, vegna undanfarnu samgongu legði fram um broyting av løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnuna.
Grundtankin aftan fyri uppskotið er, at tá altjóða marknaðarprísurin á alifiski er serliga høgur, er tað rímiligt at hava eitt hægri gjald, enn núverandi lóg ásetur.

Galdandi lóg ásetur, at loyvisgjaldið í mesta lagi er 5% av søluprísinum, tá altjóða marknaðarprísurin fer upp um 36,- kr./kg. Hetta uppskotið flytur prosentsatsin upp á í mesta lagi 10%, tá marknaðarprísurin er serliga høgur.

Serliga nýbrotið við hesum uppskotinum er, at framleiðsluprísurin á alifiski verður dagførdur árliga, so at skilja, at útroknaði framleiðslukostnaðurin í t.d 2022 verður brúktur sum grundarlag í 2024. Tað er alneyðugt at hava rættast møguligt grundarlag, tá man ásetur eitt gjald, sum tekur støði í søluprísinum.

Undir viðgerðini hava umboð fyri vinnuna víst á, at framleiðsluprísurin kann broytast rættiliga nógv í eitt 2 ára skeið. Hesum er hesin minnilutin samdur í, og tí eigur man at hyggja eftir, um tað hevði verið rættari, at framleiðsluprísurin tekur støði í ½ árs ella ¼ árs roknskapartølum.

Uppskotið fer at hava ta avleiðing, at tá marknaðarprísurin er høgur ella serliga høgur, fer alivinnan at rinda meira, enn hon ger í dag, og tá prísurin er lágur ella miðal, fer vinnan at gjalda nøkulunda tað sama ella minni, enn hon ger ídag.
Tað er sera trupult neyvt at siga nakað um, hvussu inntøkan fer at broytast við hesum lógaruppskotinum. Endamálið í sær sjálvum er heldur ikki, at uppskotið skal geva meira ella minni í landskassan, men heldur at hava eina rætta og gjøgnumskygda skipan, sum tekur atlit til bæði lívfrøðiligu og fíggjarligu gongdina í vinnuni.

Undir nevndarviðgerðini hevur spurningurin um, hvørt broytingin í lógini fer at ávirka viljan og evnini hjá fyritøkum at meirvirka t.d. laksaúrdráttir. Minnilutin ásannar, at uppskotið kann hava ávirkan á, hvussu fyritøkur velja at disponera sína framleiðslu, men tað ber ikki til við vissu at siga nakað neyvt um hetta.
Tó metir hesin minnilutin, at um ein gjøgnumskygdur marknaðarprísur í framtíðini verður skrásettur fyri sokallaðar VAP (value added products) vørur, eigur støða at takast til, hvørt hesar vørur skulu hava eitt annað útrokningargrundarlag enn tað, sum er galdandi fyri feska vøru.

Minnilutaumboð Sambandsfloksins hava undir viðgerðini av hesum uppskotinum frá Sambandsflokkinum og av løgtingsmáli nr. 93/2022 frá samgonguni um broytingar í lógini um tøkugjald, roynt at funnið eina semju um tøkugjaldsstigan. Hesin minnilutin heldur, at ein breið semja hevði gagnað vinnuni og lagt hesi viðurskifti í eina trygga legu.
Útgangsstøðið var at finna eitt miðaltal upp á í mesta lagi 15% av søluprísinum. Við hesum uppskoti hava umboðini hjá Sambandsflokkinum strekt seg sera langt, men uttan úrslit. Umboðini í samgonguni ynskja ikki eina semju í hesum málinum.

Ongin ivi er um, at ásetingin av tøkugjøldum hevur eina beinleiðis ávirkan á evnini og viljan hjá fyritøkunum at gera íløgur. Minnilutin er av tí greiðu fatan, at um vit seta tøkugjaldið ov høgt, fer tað at hava ávirkan á íløguhugin sum heild.
Vinnan er sera íløgutung, og rúm tíð er frá, at íløgan verður gjørd, inntil úrslitið slær ígjøgnum. Hendan fortreytin er sera umráðandi at hava í huga, tá vinnan verður skattað á hendan hátt, og hetta er uttan iva nakað, sum vinnan hevur við í viðgerðini, tá framtíðar íløgur verða viðgjørdar.
Tað er ein hárfín javnvág ímillum, nær vinnan heldur, at tað er ráðiligt at fremja íløgur, ella heldur at lata vera.
Tinglimirnir hjá Sambandsflokkinum halda, at við hesum uppskotinum heldur man seg innanvert markið fyri, har vinnan og landið hvør sær halda, at tey fáa sín lutfalsliga part av ágóðanum í alivinnuni.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Árni Skaale og Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Skipanin við tøkugjaldi hevur verið í gildi í nøkur ár og ein eftirmeting var neyðug. Uppskotið hjá tinglimunum í Sambandsflokkinum lækkar skattin, tá prísurin er lágur og hækkar skattin, tá prísurin er sera høgur.
Hesin minnilutin er undir viðgerðini vorðin sannførdur um, at vit eiga heldur at fara til eina skipan við hægri partafelagsskatti, tá prísurin er høgur. Verandi skipan er bæði stýrandi og tálmandi fyri nýíløgur í vinnuni, men tað hevði ein skipan við partafelagsskatti ikki verið. Minnilutin vísir annars til sínar viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 93/2022.
Í mun til, at uppskotið hjá tinglimunum fyri Sambandsflokkinum kann verða tálmandi fyri nýíløgur í framtíðini, so leggur uppskotið hjá landsstýrinum eina køvandi hond yvir íløguhugin hjá vinnuni. Har skal toppskatturin 4 faldast, og lønandi íløgur fara at geva undirskot, bara av skattinum.

Hesin minnilutin ynskir eina partafelagsskattaskipan, men skulu vit velja millum uppskotið hjá Sambandsflokkinum og skattaokið á vinnuna frá landsstýrinum, so er tað fyrra frægari.

Við hesum viðmerkingum fer hesin minnilutin at taka støðu í tingsalinum.

Vinnunevndin, 12. mai 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen